# Kristindómur – Kristindómur

(fyrsti partur av trimum)

RICHARD DANIELSEN



Kristindómur hevur verið nógv frammi í teimum føroysku bløðunum í seinastuni. Bíblian verður álopin, men ein partur av kristindóminum skal varðveitast, sigur onkur. Onnur hava hug at skilja kirkju frá stati. Myndugleikarnir eru í ferð við at yvirtaka kirkjuna. Samstundis sum tosað verður um at flyta evsta valdið í kirkjuni frá hennara hátign Margrethu drotning til løgting ella landsstýri, rópa summi upp um, at Guds orð ikki má takast uppá tungu í løgtinginum, ella í minsta lagi, tað má ikki vera ov nógv av tí. Eitt sindur løgið tykir mær. Altso, okkara fólkavaldu skulu vera evsta vald í kirkjuni, tað verður sæð ógvuliga stórt í, tá ið tey ganga skrúðgongu saman við bispi, dómsprósti og prestum í kirkjuna einaferð um árið, á ólavsøku, men Guds orð má helst ikki verða nevnt har allíkavæl.

Mann hetta ikki tykjast eitt sindur fløkjasligt, fyri tann, sum hugsar eitt sindur. Jú, tað er fløkjasligt.

Eg fari at royna eftir førimuni at greina eitt sindur út frá skriftini, hvat ið er kristindómur. Hvaðani stavar navnið – kristin - frá, hvør hevur rætt at bera hetta navnið. Kunnu vit gera okkum eina trúðarjáttan, ella filofisera okkum til okkurt slag av átrúnað og so kalla okkum kristin.

Heitið kristin kom fyrstu ferð fyri í einum býi norðarlaga í Sýrialandi, sum kallaðist Antiokia. Hetta hendi í tí fyrstu tíðini, tá ið evangeliið varð prædika fyri heidningum. Ta fyrstu tíðina talaðu ápostlarnir bara evangeliið fyri jødum, men í ápostlasøguni 11. kap. lesa vit, at nakrir menn úr Kýpern og Kýrene talaðu evangeliið til grikkar, altso heidningar við, og stórt tal kom til trúgv og vendi við til Harran. Síðani lesa vit , at Barnabas og Saul (Paulus) komu hagar, har var stór samkoma, og teir lærdu har eitt heilt ár. Síðani lesa vit, at tað var har, at lærisveinarnir fyrst vóru kallaðir kristnir.

Legg til merkis, tað vóru lærisveinarnir, ið kallaðir vóru kristnir. Hvørji vóru hesi? Jú hesi somu vera í ápostlasøguni 9,2 kallað: Tey sum hoyrdu til vegin. Hesi vóru samkoma Guds , tey trúgvandi, tey, sum høvdu latið seg doypa. Tey vóru ein flokkur, sum helt seg saman, hini tordu ikki at halda seg afturat teimum, men fólkið prísaði teimum stórliga, ápostlasøgan 5,13. Altso ein flokkur av fólki, endurfødd við trúgv á Harran Jesus. Hesi eru tey, sum trúgva, at Jesus er Kristus Sonur Guds. Jesus talar um hetta, tá ið hann sigur við Nicodemus “Tit mugu føðast av nýgggjum. Jóh. ev.3,3.

Bíblian er so greið hesum viðvíkjandi. Tað, sum vit síggja, táið vit lesa nýggja testamentið er, at tað vóru samkomur á hesum ymisku støðunum, har evangeliið hevði vunnið fram, og tá ið Paulus lærir hesar samkomur, lærir hann um eina stóra globala samkomu, øll tey, sum trúgva á Jesus Kristus hoyra til her. Tey, sum ikki trúgva á Jesus sum Kristus, hoyra ikki við her. Orð Guds skilir sundur. Helst var tað hetta, Jesus hugsaði um, tá ið hann talar um, at hann ikki var komin við friði til jarðar, men við stríði, Luk.ev.12,51. Hann tekur til dømi, at faðir og sonur liggja í stríði, og húsfólk mansins eru fíggindar hansara. Tað eru tveir flokkar, tey sum trúgva, og tey sum ikki vilja trúgva.

Tað kann tykjast løgi, at Jesus segði hatta. Var hann ikki komin við friði til jarðar. Var tað ikki júst tað ið einglarnir kunngjørdu “friður á jørð” jú vissuliga var tað tað. Eitt annað skriftstað sigur :“Hann er friður okkara.” Men tey sum standa Gudi ímóti og orði hansara - ikki vilja trúgva, har verður stríð. Rættur kistindómur kann ikki ganga undir kompromis, her ber ikki til at sita ímillum tveir stólar. Sannleikanum trúgv í kærleika, áminnir Paulus, og aðrastaðni sigur hann: ”Ikki út um tað, sum skrivað stendur.

Menn tað varð, júst tað ið hendi. Farið varð út um tað, sum skrivað stendur. Lærdómar, sum ápostlarnir ikki lærdu, eru komnir við innan sokallaðan kristindóm. Statur og kristindómur vóru vavd saman, og so varð alt ein fløkja.

So ein kristin, er ein sum trýr á Jesus sum son Guds. Ein, sum hevur tikið ímóti honum sum sínum frelsara. Hann er eitt Guds barn. Jóh ev. 1,12. Framvegis, tey eru, tey sum hoyra til vegin, lærisveinarnir, samkoma Guds. Skriftin brúkar onnur nøvn eisini: Likam Kristusar, hús Guds, kongligur prestaskapur osfr.

Velja vit ikki at trúgva á bíbliuna, men heldur at upphugsa okkum ein gud, sum kanska er góður, náðiríkur, og hvat annað vit vilja hann skal vera, taka nakað úr bíbliuni, og nakað frá okkum sjálvum, og soleiðis evna okkum hann til. Ja, so kunnu vit tað, tað verður okkara væl, men vit mugu ikki kalla tað kristindóm.

Vit kunnu kalla slíkt, hvat vit vilja, men Gud kallar tað avgudar. Um vit telgja teir úr træi ella telgja teir til í hugaheiminum, eru teir avgudar eftir bíbliuni. Hon viðurkennir bert ein Gud og ein Harra, Jesus Kristus.

(Framhald)




# Ikki tyngir pungurin

Konur eru kvikar, dugnaligar og góð arbeiðsmegi. Tær geva køllum einki eftir. Kortini eru menninir í stórum meiriluta teirra, sum hava vald í stjórnarmálum og fyritøkum, sum eiga og ráða yvir pengum og sita í nevndum og ráðum. Kvinnurnar bæði vilja og eiga eisini at fáa fótin fastan hesum økjum, tí ikki ber til at tosa um veruligt fólkaræði í nøkrum samfelag, uttan at bæði kynini eru javnsett á hesum økjum.

Ber tað til at tosa um veruligt fólkaræði, tá ið kvinnur eru minkandi lutfall av teimum, sum stjórna fyritøkum og kapitali og sita í nevndum og ráðum? Ber tað til at tosa um veruligt fólkaræði, har sum kvinnur fækka á tingi, og tá at tær eru langt frá at vera helvt av valevnum, soleiðis sum tað var á seinastu tingvalum bæði á Íslandi og í Føroyum?

Menn eru ikki eins og kvinnur. Teir hava annan royndsluheim og síggja viðurskiftini við øðrum eygum enn kvinnur. Í ymisku royndum kynjanna eru goymd virði, sum samfelagið eigur at nýta. Saman eru kynini sterk. Har sum einans sjónarmið hjá monnum telur, verður sjónin einoygd. Fullkomið sýni fæst, tá ið bæði eyguni virka saman – tá ið sjónarmiðini hjá báðum kynum koma fram.

Fyrsta konan, sum varð vald í Altingið, Ingibjørg H. Bjarnason, er søgd at hava verið løtt upp á sporið, bragdlig, sera javnstøðusinnað og væl skorin fyri tungubandið. Søga sigur, at einaferð tá ið hon fór rennandi við ferð upp gjøgnum trappurnar á Altingi møtti hon tingforsetanum, sum segði skundisliga við hana, hesa einastu tingkvinnu, ”Sum tú ert løtt á føti, frú Ingibjørg”. Svaraði hon tá, stíliga í lopi: ”Ikki tyngir pungurin”. Í hesum orðum hennara vóru innballaðu boðini: Eg eri kvinna, skundi mær og havi nógvar talentir. Kvinnur eru ikki eins og menn. Tó hava tær eins nógv og gott at lata frá sær.

Framskygdir føroyingar fáa nú kærkomið høvi til at styrkja lut kvinnurnar í føroyska samfelagnum við at gera nýtslu av portalinum www.kveik.fo. Heimasíðuna hava framtakssamar kvinnur sjálvbodnar evnað til, og ynski eg teimum eydnu við hesum týdningarmikla og glæsiliga tiltaki.

Áhugaðar og dugnaligar kvinnur kunnu nú koma sær lættliga fram við at skráseta seg á nevnda portali. Um føroyingar ynskja framgongd og størri gróður í samfelagnum, mugu teir gera sær gagn burtur úr megi og virði, sum býr í Kveik-kvinnunum. Tillukku føroyingar, konurnar eru við í leiki - tí ikki tyngir pungurin ...:)



**Siv Friðleifsdóttir, heilbrigðis- og tryggingarmálaráðharri á Íslandi**
*(…og áhugað í javnrættindi á Íslandi og í Føroyum eins og aðrastaðni)*

# Løgmaður tosar ikki samgongunnar vilja tá hann tosar blokkskerjing

JOHAN DAHL
løgtingsmaður



Vit eru tríggir samgonguflokkar sum hava sett nøkur ítøkilig mál í okkara samgonguskjal, sum vit eru væl á veg til at gjøgnumføra hetta valskeiðið.

Tað stendur hinvegin **ikki ein bókstavur í samgonguskjalinum um minking av blokkinum.**

Løgmaður okkara sum er samgonguleiðari hevur meldað út, at hann vil hava blokkin burtur 2015 – tað gylta ár, har alt verður loyst úr lagdi og so sára gott fyri vælferðasamfelagið Føroyar.

Hesi boð vóru so aftur at hoyra á DR1 í vikuskiftinum og haldi eg, at hetta er átaluvert.

Gongur tað nú so fantastiska væl í samfelagnum, sum løgmaður vil geva fatan av, ja so væl, at blokkurin kann skerjast – eg loyvi mær at ivast.

Tað minnir ikki sørt um 80´ini - og tann endin kann gerast bráður.

Eitt er, at formaður Javnaðarflokkins og samgonguleiðarin sigur sína hugsan – **men** hann skal ikki tosa sum samgonguleiðari um skerjing av blokkinum - har er Sambandsflokkurin ikki við og Sambandsflokkurin er partur av samgonguni.

Javnaðarflokkurin sum sigur seg vilja verja tann veika í samfelagnum fremst av øllum, hvat er eftirhondini hansara veruliga aðalmál?

Hevur flokkurin nakra uppskrift upp á inntøkuskapanina sum skal til ístaðin fyri blokkin?

Uttan hesa verður vælferðin skerd, og tað veit løgmaður eisini.

Jú víst vilja vit allir verða sjálvbjargnir, vit vita øll, at tað verða vit einans við størri inntøkuskapan í samfelagnum, og tá meini eg **ikki inntøkuskapan við størri óbeinleiðis skattum og avgjøldum**, men øktum vinnumøguleikum.

Um vit ikki eru førir fyri at fáa inntøkuskapanina til vega, sum kann fyllast í holini sum verða orsakað av blokkniðurskurðinum, so fær samfelagið ein trupulleika, tí inntøkurnar skulu fáast til vega so ella so fyri at halda kostnaðin av vælferðartænastunum framyvir.

Higartil hava vit ikki verið førir fyri at skapa hana, og tíðin vil vísa, hvussu vit vera førir fyri hesum.

Mær kunnugt so hevur Javnaðarflokkurin frá byrjan verið ein ríkisfelagsskapssinnaður flokkur , men er blivin eins loysingarsinnaður og Miðflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, tíverri fyri javnaðarveljaran.

Vágur 10.04.2007